# 100 ár síðan sanatoriið opnaði

**Herfyri høvdu vit eina Miðviku í samband við at 100 ár vóru liðin, síðan mjólkaforsýningin byrjaði sítt virksemi. Men tað hendi meira í 1908, nevniliga at sanatoriið varð liðugt og fór at taka ímóti sjúklingum. Vit fara at tríva í hesa søgu**


**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Sanatoriið gjørdist ein stórur partur av okkara tuberklasøgu, sum kom at liggja sum ein skuggi yvir okkara samfelag í mong ár.

100 árs dagurin er sjálvsagt eitt gott høvi at varpa ljós á hesa søgu. Hetta hevur higartil í ár verið gjørt av postverkinum við at geva út tvey frímerki við motivum um tuberklasøguna. Útgávudagurin var 11.2.2088, og sniðgevari er ein av okkara bestu listarmonnum Anker Eli Petersen.

FF-blaðið eigur sín leiklut í hesi frímerkjaútgávu. Umframt vanligt fakfelags- og fiskivinnutilfar royndi blaðið at fáa á prent søguna og lagnusøguna hjá fiskimonnum og annars hjá tí arbeiðandi fólkinum. Her varð eisini gjørt nokk so nógv burtuur tuberklasøguni, sum sanniliga eisini var ein partur av søguni hjá fiskimonnum.



*Anker Eli Petersen er sniðgevin av hesum og øðrum frímerkjum. Hann skipar eisini fyri heimasíðini Faroetamps*

Men tað vóru kreftir, sum fóru í herna fyri at fáa jarðlagt FF-blaðið og hetta eydnaðist.

### FF-blaðið "livir" enn

Men FF-blaðið er kortini ikki heilt fyribeint. Beinleiðis parturin hjá FF-blaðið í hesi frímerkjaútgávu er, at onnur myndin á øðrum frímerkinum er av einum fiskimanni, sum verður røntgenkannaður av Dr. Magnussen, ein støða sum túsundir av fiskimonnum hava verið í. Hendan myndin er komin úr FF-blaðnum í samband við eina grein um tuberklar.

Afturat hesum eru tvær greinir um tuberklasøguna lagdar inn á eina av heimasíðunum hjá Postverkinum, www.faroestamps.fo

Umframt á føroyskum eru tær eisini týddar til enskt. Her er talan um eina frásøgn um arbeiðið hjá "Pirkuni", Marin Skipanes á Skipanesi, sum ferðaðist kring landið saman við Dr. Magnussen at kanna fólk fyri tuberklar og at vaksinera tey.

Eisini er grein úr FF-blaðnum hjá Katrin Dahl um Vilhelm Magnussen og hansara virki á hesum øki. Grundarlagið fyri hesum greinum er framløgur, sum tær báðar Marin og Katrin høvdu á ymiskum plássum fyrst í 2006.

Hervið fekk FF-blaðið uppreisn fyri umrøddu viðferð. Nú verður hetta tilfar eisini sæð av einum munandi størri publikum enn fyrr. Nevnda heimasíða hevur 400 vitjanir um dagin, ella 12.000 um mánaðin úr nógvum londum um allan heimin.

### Søgan um byrjanina av Sanatoriinum

Undan næstseinasta aldarskifti fóru tuberklarnir at gerast ein rættiligt sótt í Føroyum. Tað er umleið í 1906, at spurningurin um at byggja eitt sanatorium fyri tuberklasjúk rættiliga verður tikið upp í løgtinginum.

Løgtingið kom inn í málið við at seta eina løgtingsnevnd at hava hetta mál um hendi, og nevnast kann, at ein slík nevnd sat heilt til 1948. Frágreiðingar hjá hesi nevnd síggjast í løgtingstíðindi, sum tískil er ein týðandi kelda til hesa søgu ár fyri ár.

Í fyrstu nevndini vóru Zacharias Nielsen úr Sandavági, Joen Hendrik Poulsen úr Skopun, Jógvan Michael Matras úr Hvannasundi, Søren Emil Müller úr Havn og Joen Poulsen av Strondum.

Ein niðurstøða hjá nevndini var, at eitt slíkt sanatorium ikki hevði brúk fyri lækna fulla tíð. Hetta skuldi vera ein partur av virkseminum hjá kommunulæknanum í Havn. Eisini var avrátt, at sanatoriið skuldi hava 32 seingjapláss. Hetta tal varð seinni økt.

Ein spurningur, sum skjótt tók seg upp var, hvar í landinum eitt slíkt sanatorium skuldi liggja.

Her avnoktaði lokalpolitikkur seg ikki. Nevndin býtti seg í ein meiriluta og tveir minnilutar. Meirilutin helt, at sanatoriið skuldu liggja í økinum kring Havn. Læknin í Havn skuldu røkja sjúklingarnar. Men samstundis skuldu hann ikki hava loyvi at hava sjúklingar uttan fyri Havnina, har tað ikki var landafast, tá veðurlíkindi kundu forða læknanum at koma aftur til Havnar eftir einum degi.

Jógvan Poulsen, sum var valdur í Eysturoy, var við í meirilutanum. Men hann helt annars, at sanatoriið eins væl kundu ligið í Eysturoynni, sum á eystara armi av Skáafjørðinum ella í Sundalagnum. Sambandið hagar úr restini av landinum kundi vera eins gott og til Havnar.

Hjá meirilutanum var eisini ivi um, hvørt tað fór at bera til at fáa nóg mikið av mjólk á leiðini kring Havnina. Tørvur var á minst 80 litrum um dagin. Men hildið varð, at sáttmáli kundu gerast við mjólkarframleiðarar uttanfyri Havnina.

Annar minnilutin, vágatingmaðurin Zacharias Nielsen, helt, at Sørvágsvatn var vakrasta staðið at leggja eitt slíkt sjúkrahús, og her var eisini besta veðurlag fyri tey sjúku. Her var í hvussu er nóg mikið av mjólk, og fekst Smiril at sigla í Vágarnar var ferðasambandið eingin forðing.

Sandoyartingmaðurin J. H. Poulsen helt, at við Sandsvatn var avgjørt besta pláss av teimum trimum, sum vóru í uppskoti, og her var eisini vakrast.

Tað var ikki lætt at koma í Sandoynna, tá veðrið var ringt. Men sjúklingarnir kunnu leggjast inn á hospitalið at bíða, inntil veðrið batnaði.

At tað hevur verið trupult at fáa lækna til Sandoynna er ikki nakað nýtt. Ein grundgeving var eisini, at sanatorium í Sandoynni eisini vildi loysa tann trupulleikan.

Løgd var fram ein váttan frá Havnar kommunu, at teir vildu gera veg niðan í Hoydalar, um




*Hetta eru frímerkini, sum postverkið hevur givið út í samband við tey 100 árini, síðan vit fingu eitt sanatorium*